## Brian skorar fyri Glostrup

Brian Andresen gjørdi góðan mun, tá ið hann í fjørsummar kom at spæla við B68. Danski álopsspælarin gjørdi fleiri mál og gekk annars undan á vøllinum. Nú er Brian Andresen aftur í Danmark og spælir fyri Glostrup. Í gjár skoraði hann eitt av málunum, tá ið Glostrup vann 3-0 á Skovlunde í donsku 2. deild eystur.

## Julian og teir vunnu

Julian Johnsson og liðfelagarnir í Svendborg spældu í gjár ímóti Skovbakken í donsku 2. Deild vestur, og tað eydnaðist Julian og teimum at vinna dystin ímóti botnliðnum. Svendborg spældi á heimavølli og vann dystin 3-0. Í hálvleikinum var støðan 2-0. Svendborg liggur mitt á stigatalvuni – felagið er nummar 8 av 16 liðum í deildini.





*B36 tryggjaði sær síni mál undan steðginum, tá teir við væl skipaðum spæli høvdu greiða yvirvág. Og so eydnaðist tað at standa ímóti, tá ÍF trýsti í seinna hálvleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-B36 1-2 (0-2):

# Hjá B36 gongur tað sum eftir ánni

*ÍF*

*B36*

**Hóast tað ikki hevur verið roknað nakað serligt við B36, so er úrtøkan full eftir sigur í Fuglafirði ímóti ÍF, sum var um reppið at røkka javnleiki**

**FÓTBÓLTUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Lagið var fínt á floksmonnum, tá ið teir í góðveðrinum fóru úr Fuglafirði seinnapartin í gjár. Í viðførinum høvdu teir 2-1 sigur. Hóast sigurin var tepur, so taldi hann eins nógv og allir aðrir sigrar.

Spurnartekin hava verið sett við, hvussu tað fór at hilnast hjá B36 í ár. Higartil kann tað ikki sigast annað, enn at úrtøkan hevur verið góð – tveir dystir og tveir sigrar.

Hesa ferð vardi Jóan Pauli Dahl Jakobsen B36 málið í staðin fyri skadda Tróndur Vatnhamar, og tað var bara eina ferð, at hann noyddist í meskarnar eftir bóltinum. Tað var tíðliga í 2. hálvleiki, tá ið ÍF, sum eftir steðgin legði bragdliga fyri, tiltuskaði sær fríspark í vinstru. Balazs legði til handara stólpa, har Bartal Eliasen við høvdinum sendi bóltin í málið.

Onkra aðra ferðina fór bólturin framvið Jóan Paula, uttan at tað eydnaðist at fáa mál. Tíðliga í 1. hálvleiki bjargaði ein av B36 monnunum á strikuni (fuglfirðingar vildu vera við, at bólturin hevði verið innanfyri strikuna, men tað var dómarin ikki samdur við teimum í), og fram ímóti dystarenda, tá ið ÍF legði nógv fyri í royndini at javna, brast skotroynd frá Bartali Eliasen í stólpan.

Fyrstu trý korterini var B36 greitt omaná, og tá eydnaðist teimum at skjóta tvey mál. Í báðum førum var heimaverjan lítið sannførandi. Liðformaðurin Klæmint Matras setti hol á, eftir at Jákup á Borg hevði lagt frísparkssending úr 35-40 metrum í brotsteigin. Verjan drálaði, og eftir at bóilturin hevði tikið í fleiri bein, stýrdi Klæmint Matras bóltin í málið aftanfyri Andras Gango.

Sjey minuttir undan steðginum pakkaðu fuglfirðingar stóra gávu upp fyri gestunum, sum takkaðu fyri og tóku av. Miðverjin Jonn Thomsen var óansin, úr málinum, at bólturin fór framvið honum. Jákup á Borg takkaði fyri, og harvið var brekkan hjá ÍF tung.

- Vit eru væl nøgdir. Tað ræður um at leita møguleikarnar upp, og tað gjørdu vit. Vit kundu havt skorað fleiri mál í 1. hálvleiki, og hóast teir í 2. hálvleiki royndu at trýsta, so var tað bara Bartal, sum var vandamikil, og eg haldi, at vit kláraðu hann væl, var viðmerkingin hjá Jákupi á Borg.

ÍF venjarin, Jón Simonsen, segði seg avgjørt ikki vera nøgdan við 1. hálvleik, tá ið teir í B36 vóru illa ansaðir.

- Í 2. hálvleiki høvdu vit gott tak á teimum, og tá spældu vit okkum til fleiri møguleikar, men tíverri vóru vit ikki nóg neyvir. Sunnudagin skulu vit spæla á Argjum, og tá verður tað avgerandi hjá okkum at koma á talvuna.

*Nær verður Rógvi Jacobsen at siggja á ÍF liðnum?*

- Hann er farin at venja, men vit rokna ikki við, at hann verður á liðnum í hesum mánaðinum, sigur ÍF venjarin.

B68-AB 1-0 (0-0):

# Tað fløvaði í sólini á Svangaskarði

*B68*

*AB*

**Talan var um arbeiðssigur, staðfestir B68 veteranurin Øssur Hansen, og hóast teir einki fingu við sær, so sigur AB formaðurin seg vera nøgdan við hugburðin hjá hansara monnum**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Veðrið var frágera gott, og hýrurin á heimafólkinum var góður, tá ið seinasta bríkslið ljóðaði á Svangaskarði seint seinnapartin í gjár. B68 hevði við 1-0 sigri á AB tryggjað sær trý tey fyrstu stigini í ársins landskapping, og tað kom væl við:

- Sigurin fløvar. Fyri einari viku síðani taptu vit ímóti HB, og næstu ferð skulu vit spæla á útivølli ímóti EB/Streymi. Í fjør hilnaðist tað einki serligt á heimavølli. Tað er her, at vit eiga at vinna flestu stigini, og ikki minst ímóti AB var tað týdningarmikið, eftir at vit hósdagin taptu á Argjum í steypakappingini, staðfestir veteranurin Øssur Hansen, sum aftur hesa ferð var vongverji í vinstru.

Øssur Hansen heldur, at talan var um tætta uppgerð, og at tað vóru hugburðurin og arbeiðið, sum høvdu stóran og avgerandi týdning.

Besta B68 møguleikan í 1. hálvleiki fekk Bogi Gregersen eftir innlegg frá Øssuri Hansen, men bólturin streyk yvir málinum. Øssur Hansen átti eisini næstsíðsta fótin á øðrum góðum heimamøguleika, men ta ferðina stútaði miðverjin Jóhan Dávur Højgaard omanfyri.

Thomas Hans Rubeksen fekk stutt undan hvíldini fínan AB møguleika, tá ið hann eftir at hava vunnið bóltin frá heimaverjuni gjørdist einsamallur við Vlada Filipovic, sum stórbjargaði.

Tá ið Pól Jóhannes Justinussen varð fluttur úr miðverjuni og longri fram á vøllin, spenti heimaliðið álopsbogan, og tá eydnaðist at fáa sigursmálið. B68 steðgaði AB álopi, bólturin varð lagdur fram í vinstra borð, og Keita stýrdi við høvdinum innleggið frá Pól Jóhannesi Justinussen í kassan.

AB var tætt við í fleiri deyðbóltsstøðum, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál, og hóast tapið, so var formaðurin, Andrass Drangastein, ikki heilt misnøgdur:

- Sjálvandi høvdu vit viljað havt vunnið stig og helt øll trý. Vit høvdu møguleikar, men vit vóru ikki hepnir. Higartil hava marginalirnir ikki verið okkum til fyrimunar, men um hugburðurin verður tann sami næstu ferðirnar, so fara vit heilt víst at vinna stig og sigrar, helt AB formaðurin.